# Kjallarabólkur á festival


Eyðbjørn Jacobsen/SF

Grandma's Basement, sum arbeiða við nýggjari útgávu, spæla á Summar Festivalinum í august.

Framfýsni bólkurin Grandma's Basement, sum spælir popprock við humori, verður við á Summar Festivalinum í ár.

Grandma's Basement er tónleikabólkur úr Klaksvík, sum bæði hevur spælt sangir inn og havt væleydnaðar framførslur á palli. Grandma's hevur nøkur fá ár á baki, men teir hava langt síðani gjørt vart við seg við sangum sum Bangna Beistið, Minnini, Dansurin og Getze.

Nú arbeiðir bólkurin við fyrstu útgávuni, sum skal koma út í summar.

Sangirnir hjá bólkinum eru argandi, erligir og stuttligir. Teir syngja um nakað av tí, sum teir uppliva í gerandisdegnum, og tað verður gjørt við einum skálkabrosi.

Grandma's Basement spældi á Summar Festivalinum í fjør, og tann framførslan lukkaðist so væl, at fyrireikararnir hava sent boð eftir bólkinum at spæla aftur í ár.

# Ferðavinnudagur á Hotel Hafnia

TÍÐINDASKRIV
*Vinnuhúsið*

Mikudagin 24. mars frá kl. 12.00 til 16.30 skipar Ferðavinnufelagið fyri ferðavinnudegi á Hotel Hafnia.

Ferðavinnufelagið, ið varð sett á stovn í 2008, hevur nú tikið stig til at savna ferðavinnuna til ein dag, har vinnan fær møguleika at hittast til prát og ymiskar framløgur.

Dagurin er ætlaður øllum teimum, sum á ein hvønn hátt starvast innan ferðavinnuna, ella veita tænastur til hesa í vinnuligum samanhangi. Ein nýtist ikki at verða limur í Ferðavinnufelagnum fyri at taka lut á degnum, men tað fer at bera til at tekna seg sum lim á staðnum.

Dagurin verður í ár hildin á Hotel Hafnia í Havn, og byrjar kl. 12.00 við standandi buffét. Úr skránni kunnu nevnast framløgur frá Atlantic Airways og Smyril-Line um teirra marknaðarføring. Eisini kemur umboð úr Uttanríkisráðnum, at greiða frá um teirra átøk, og hvussu tey hugsa at marknaðarføra Føroyar. Seinni verður eisini lagt upp til kjak.




Skráin leggur eisini upp til, at tað eru møguleikar til nógv prát millum innsløgini, soleiðis at tey sum virka í ferðavinnuni, kunna koma hvørjum øðrum við, deila hugskot og kanska menna nýggj tilboð og annað.

Í hesum døgum fer innbjóðing út, til tey sum eru limir í Ferðavinnufelagnum, men eisini onnur, sum ikki eru limir, hava møguleika at verða við. Tilmelding fer fram við at venda sær til Vinnuhúsið telefon: 309900 ella t-post: industry@industry.fo merkt: Ferðavinnudagurin.

Kostnaðurin fyri tiltakið er 300 krónur fyri hvønn luttakara og freistin at boða frá luttøku er mánadagin 22. mars.

Ferðavinnufelagið vónar, at allir partar, sum starvast við ferðavinnu í Føroyum, seta sær tíð av til dagin.

# Kjakfundur um at koyra børn fyrr í skúla

**Tjóðveldi skipar fyri kjakfundi í Miðlahúsinum í annaðkvøld klokkan 19:30. Evnið er, um børn okkara fara ov seint ella ov tíðliga í skúla**

KJAKFUNDUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Vit hoyra ofta, at børn aðrastaðni fara í skúla, langt áðrenn okkara børn fara í skúla. Fólkaskúlalógin sigur, at í Føroyum skalt tú í skúla í tí kalendaraárinum tú fyllir 7 ár. Men, hvat er tað, sum ger, at okkara børn skulu so seint í skúla í mun til onnur lond, spyr Tjóðveldi, sum í annaðkvøld skipar fyri kjakfundi í Miðlahúsinum í Havn um evnið.

Hvat meinar sálarfrøðin, hvat meina lærarar og pedagogar og feløgini, og hvat meinar tú um hetta evni? Er tiðin búgvin at gera broytingar, og er tað neyðugt?

**Við pallborðið koma at sita:**
- Heri Kragesteen, sálarfrøðingur
- Jónleif Johannesen, lærari og skrivari í Føroya Lærarafelag
- Annika K. Joensen, Leirvík, lærari og lesivegleiðari
- Jógvan Philbrow pedagogfelagið
- Maud Wang Hansen, pedagog, Tórshavn
- Tony Strøm, Hoyvík, lærari og lesivegleiðari

Annita á Fríðriksmørk verður orðstýrari.

# Peningastovnarnir heinta upplýsingar um bústað

TÍÐINDASKRIV
*Felagið Føroyskir Peningastovnar*

Seinastu dagarnar hava Føroya Banki og Eik Banki sent ávísum kundum brøv, har teir biða um dagførdar upplýsingar um bústaðin. Norðoya Sparikassi og Suðuroyar Sparikassi hava fingið til vega hesar upplýsingar við kundasamrøðum og hava tí ikki sent kundum brøv.

Kundar hjá peningastovnunum hava spurt, hví hetta verður gjørt. Orsøkin er, at nýggj kunngerð um kapitaldekning er komin í gildi í Føroyum. Broyttu reglurnar hava við sær, at verandi mannagongd í sambandi við at virðisáseta sethús í Føroyum ikki er nøktandi.

Í framtíðini verða sethús virðismett eftir einum hagfrøðiligum myndli, ið nýtir upplýsingar frá peningastovnunum um eitt nú sølupris, byggiár, matrikulnummar og búvídd sum grundarlag. Funnið verður við hesum upplýsingum fram til marknaðarvirðið á teimum einstøku bústøðunum í ymsu økjunum.

Fíggjareftirlitið og Fíggjarmálaráðið hava fyribils góðkent hesa mannagongd.

Nú nýggi útrokningarhátturin verður mentur, dagføra peningastovnarnir bústaðarupplýsingar hjá teimum kundum, har skrásetingar um bústaðin ikki eru nøktandi. Vónandi kann hetta verða gjørt í besta samstarvi millum peningastovnarnar og kundarnar.